Fiskimálastýrið

## Samskipari til Fiskimálastýrið

Fiskimálastýrið umsitur málsøkið tilbúgving og fer undir at fremja eina skipaða tilbúgving fyri Føroyar við tí endamáli at fyribyrgja, avmarka og veita hjálp, tá skaðar henda á persónar, ognir og umhvørvi, orsaka av vanlukkutilburðum og katastrofustøðum,ella tá stórur vandi er fyri hesum.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan er sambært tilbúgvingarlógini at hava eftirlit og at samskipa tilbúgvingarpartarnar og skipanirnar og at ráðgeva myndugleikunum í tilbúgvingarmálum.

- At áseta fyrisitingarligar reglur á økjum og veita ráðgeving um galdandi lóggávu og um onnur viðurskifti á tilbúgvingarøkinum.
- At ráðgeva landsstýrismanninum og miðfyrisitingini annars um faklig viðurskifti á tilbúgvingarøkinum og harvið eisini tryggja áhaldandi eftirmeting og kunning um royndirnar viðvíkjandi galdandi lóggávu á tilbúgvingarøkinum.
- At ráðgeva landsstýrismanninum um møguligan tørv á broytingum ella víðkan av galdandi lóggávu fyri tilbúgvingarøki.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur:

- útbúgving á hægri stigi so sum verkfrøði ella líknandi ella, at viðkomandi hevur starvsroyndir innan hetta økið
- starvsroyndir við atliti av samskipan og innlit í tilbúgving
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni og evni at fyriskipa

**Treytir**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøki er Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalstýrir og løgmansskrivstovan.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. oktober 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið**
Postboks 347
FO-110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálastýrið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.

## Bilur til sølu

Mazda 323 diesel, 2 ára gamal, væl viðfarin til sølu.

**Tlf. 373301**

Fiskimálastýrið

## Løgfrøðingur til Fiskimálastýrið

Fiskimálastýrið umsitur málsøkið tilbúgving og fer undir at fremja eina skipaða tilbúgving fyri Føroyar við tí endamáli at fyribrygja, avmarka og veita hjálp, tá skaðar henda á persónar, ognir og umhvørvi, orsaka av vanlukkutilburðum og katastrofustøðum, ella tá stórur vandi er fyri hesum.

Til tess at fyrireika nýggja lóggávu viðvíkjandi málsøkinum tilbúgving og umsita aðra lóggávu á sjóvinnuøkinum verður við hesum søkt eftir løgfrøðingi til áhugavert og fjølbroytt starv í Fiskimálastýrinum.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá løgfrøðinginum verður at veita løgfrøðiliga ráðgevin go at hava løgfrøðilgia málsviðgerð innan tilbúgvingarmál og fiskivinnu- og sjóvinnumál, herundir bjarging og trygd á sjónum.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur:

- løgfrøðiliga útbúgving
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni og evni at fyriskipa

Fyrimunur er, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan økið.

**Treytir**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøki er Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalstýrir og løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. oktober 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið**
Postboks 347
FO-110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálastýrið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

*Lýsið í* **sosialinum**

## Pedagogur og hjálparfólk søkist til vøggustovuna

Vegna pedagog og hjálparfólk í barnsburðarfarloyvi er eitt pedagogstarv 30 t. um vikuna leyst til setan skjótast gjørligt og fram til 1. des. 2001 og eitt hjálparfólkastarv 25 t. um vikuna frá 1. jan. 2001 og fyribils fram til 15.07.2001.

Løn og setanartreytir eru samb. sáttmála millum Fø. Pedagogfelag og Fø. Landsstýri.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett ístaðin.

Umsóknir saman við prógvum og ummælum verður at senda til

**Dagstovnin á Oyri**
460 Oyri

Umsóknarfreistin er 7/10 2000.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Jannie Christensen á tlf. 422552.

## Suðuroyar Sjúkrahús

Søkt verður eftir sjúkrasystrum til sjúklingadeildina.

1 fast starv í 0,7 tíð í øllum vaktum frá 1. november 2000.
1 starv í øllum vaktum, sum avloysari fyri sjúkrasystir frá 1. november 2000 til 30. apríl 2001.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 371133 lokal 128

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
**Suðuroyar Sjúkrahús**
**Postrúm 51**
**800 Tvøroyri**

Umsóknarfreist: 13. oktober 2000.

## DAN-JOB

Søger unge piger til vintersæson 15.12.2000 til skirestauranter i Schweiz.

Flere af vore kunder søger personale (30-40) til køkken, værelse, service og afrydderjob i Schweiz vintersæson 2000/1. www.danjob.dk

**Tlf. 0045 75711000**

Ansøgningsfristen: 30.9.2000.








## Leiðaraskeið
### Leiðsluframferð

**Endamál:**

- Tú ført vitan um og innlit í at brúka tíni evni og førleika í bólkum við felagsábyrgd fyri úrdrátti, mannagongd og arbeiðshátti
- Harafturat ført tú vitan um hættir, ið vísa á førleikar hjá tær sjálvum og øðrum við atliti at skapa grundarlag fyri framtíðar avgerðum.

**Grundhugsan:**
Skeiðið tekur støðu í hesi hugsan: Leiðarar og starvsfólk fáa í størri mun ábyrgdina av í felag at seta mál, skipa, stýra og menna loysnina av eini uppgávu í felagsskapinum.

**Innihald:**
Tað verður arbeitt út frá gerandisdegi luttakaranna við:

- Stovnan, umsiting og endurnýggjan av felags viðurskiftum
- Skipan av loysnum av uppgávum
- Eygleiðing av arbeiðshættum og feedback mannagongd
- Samrøður í starvsfólkamenning og við atliti at menna evni og førleika hjá tær sjálvum og øðrum
- Innan- og uttanhýsis sambond
- Framferðarmotiv
- Framferðarrák
- Viðgerð av tvístøðum
- Avhendan
- Leiðslu út frá givnari støðu
- Serkunnleika og leiðslu

**Tíð:** Hósdagin 19. oktober kl. 09.00 til Leygardagin 21. oktober kl. 16.15
**Staður:** **Hotl Eiði**
**Skeiðleiðari:** **Peter Gram** frá LMB
**Kostnaður:** Kr. 7.500,- fyri hvønn, íroknað matur og gisting
**Tilmelding:** Áðrenn 4. oktober 2000

*LMB (LeiðsluMenningarBólkurin) er ein arbeisbólkur, ið er samansettur av Føroya Handilsskúla, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Ídnaðarfelag og Menningarstovuni við tí endamáli at eggja til sjónir, manna leiðslur og skipa fyri skeiðum. Skeiðrøðin Heystið 2000 fevnir um hesi skeið: Leiðsluframferð - Leiðslumenning og læra at loysa trupuleikar - Grundskeið í leiðslu.*

**Skeiðini eru ætlað leiðarum, millumleiðarum og komandi leiðarum.**
**Fleiri upplýsingar og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til:**

LeiðsluMenningarBólkurin
**SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS**
**Marknagilsvegur 77 • Postmoga 177 • 110 Tórshavn • Tel 317177 • Fax 313374**

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

## NATEN 1-2-3

*- mest selda kostískoyti nakrantíð. Inniheldur 96 ymiskar lívsneyðugar vitaminir og mineralir*

-Ring og vit senda-

**Naten søla**
Tórshavn • Tel. 31 86 49

Sosialurin - 311820

## Fulltrúi

**Starv sum fulltrúi í Vinnumálastýrinum er leyst at søkja**

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:

- Ráðgeving
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- At hava eftirlit við stovnum
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

Vit hava hugsað okkum, at tú hevur samfelagsfrøðiliga útbúgving, eitt nú cand. scient. pol., cand. jur. ella cand. polit. og hevur góðan kunnleika um edv. Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt, og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið er til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir. Vit bjóða:

- Flex-tíð
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsókn við prógvum o.ø. skal verða send til:

**Vinnumálastýrið**
**Postrúm 377**
**110 Tórshavn**

Umsóknin skal vera okkum í hendi tann 16. oktober 2000. Starvið verður sett skjótast tilber.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til Arna Poulsen á tel 35 60 60.

**V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð**

## Telefonbókin 2001

**Í mars 2001 verður telefonbókin fyri ár 2001 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki og stovnar skulu boða frá um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt í næstu útgávu.



*Seinasta freist at lata broytingar inn er* ***týsdagin 31. oktober 2000***

**Hvítu síður**

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2001 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 548 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til: Teknisk avgreiðsla, Føroya Tele, Postboks 27, FO-100 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 57,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerkið:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 1.500,00 kr (ikki íroknað mvg).
Talið av búmerkjum í Hvítu síðum er avmarkað.

**Gulu síður**

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum. Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 547 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til Teleforlagið.

**Prísir:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| (A)+(D) | Standardlýsing | kr. | 650,00 |
| (B) | Stórt navn | kr. | 50,00 |
| (C) | Innramming | kr. | 100,00 |
| (E) | Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) | kr. | 20,00 |

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE

**att: Teleforlagið**
**Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**